# Kunngerðablaðið A

2023

Givið út 9. mars 2023

Nr. 30

8. mars 2023

**Fráboðan um broyting í fráboðan um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninar**

**§ 1**

Í fráboðan nr. 164 frá 22. desember 2022 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninar, sum broytt við fráboðan nr. 5 frá 24. januar 2023 og fráboðan nr. 13 frá 10. februar 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Løgmaður hevur heimildir landsstýrisins mótvegis:
1) BankNordik P/f.
2) Elektron P/f.
3) Eystur- og Sandoyartunlar P/f.
4) Føroya Realkreditstovnur (Realurin).
5) Føroyagrunninum frá 1971, vinnurekandi grunnur.
6) Norðoyartunnilin P/f.
7) Norðuratlantsbryggjuni, vinnurekandi grunnur.
8) Íleggingargrunnurin fyri Føroyar.
9) Smyril Line P/f.
10) Suðuroyartunnilin P/f.
11) Tryggingarfelagið LÍV P/f.
12) Vágatunnilin P/f."

**2.** § 8, nr. 23 verður strikað.
Nr. 24-82 verða eftir hetta nr. 23-81.

**3.** § 8, nr. 83 verður strikað.
Nr. 84-99 verða eftir hetta nr. 82-97.

**4.** Í § 8 verður aftan á nr. 99, sum verður nr. 97, sum nýtt nr. sett:
"98) Ab. nr. 1032 af 8. oktober 2019 om ikrafttræden for Færøerne af lov om finansiel virksomhed § 125 f, stk. 1, § 343 s, stk. 4 og 5, § 345, stk. 15, § 354, stk. 6, nr. 34 og 36."
Nr. 100-111 verða eftir hetta nr. 99-110.

**5.** § 20, nr. 40 verður strikað.
Nr. 41-73 verða eftir hetta nr. 40-72.

**6.** § 20, nr. 74 verður strikað.
Nr. 75-85 verða eftir hetta nr. 73-83.

**7.** Í § 32 verður aftan á nr. 13 sum nýtt nr. sett:
"14) Ll. nr. 86 frá 14. desember 1998 um útjavningarstuðul til útjaðaraøki."
Nr. 14-20 verða eftir hetta nr. 15-21.

**8.** Í § 32 verður aftan á nr. 20, sum verður nr. 21, sum nýtt nr. sett:
"22) Ll. nr. 137 frá 13. desember 2005 um at veita stuðul til infrakervið á útoyggjum."
Nr. 21-34 verða eftir hetta nr. 23-36.

**9.** Í § 33, stk. 1 verður "inntøkutrygd fiskimanna," broytt til: "inntøkutrygd fiskimanna, útoyggjastuðul og útjaðarastuðul,".

**10.** § 49, nr. 37 verður strikað.
Nr. 38-43 verða eftir hetta nr. 37-42.

**11.** § 49, nr. 44 verður strikað.
Nr. 45-71 verða eftir hetta nr. 43-69.

**12.** Í § 50, stk. 1 verður "útjaðaramál" broytt til: "útoyggjamenningarmál".

**§ 2**

Henda fráboðan kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, 8. mars 2023

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
løgmaður

/ John Rajani (sign.)